## 760 fáa heimahjálp

Hagtøl frá Hagstovuni vísa, at í 2007 fingu 760 fólk heimahjálp. Tað er 13% av teimum sum eru 67 ár og eldri. Av teimum sum fingu heimahjálp vóru 39% úr Suðurstreymoy, vísa hagtølini.



## Skipa seg skjótt í Skúvoy

Á kommunuvalinum í farna mánaði varð ein kvinna, Inga Tórarenni vald í Skúvoyar bygdaráð við 12 atkvøðum, skrivar bkv.fo. Hon kemur at sita saman við tveimum monnum, Jørgin Olaf Høgnesen, ið eisini fekk 12 atkvøður og Harry Jensen, ið fekk 9 atkvøður. Valluttøkan í Skúgvi var 83,6%. Bygdarráðið hevur ikki skipað seg, men tað verður ein av komandi døgunum. 49 íbúgvar eru skrásettir í Skúgvi.

# Ann roynir stjørnulívið

**Í gjar varð ein sangur, ið er nýskapandi í føroyskum høpi, fyrstu ferð nakrantíð spældur í útvarpi á Rás2. Unga morskranesgentan Ann Anthoniussen eigur sangin, ið nevnist Nice, og stílurin er nýmótans popptónleikur, ið ikki hevur verið royndur áður í Føroyum**



*Ann Anthoniussen er 18 ára gomul, uppvaksin á Morskranesi og hevur teilendska mammu. Nú hevur hon givið sín fyrsta sang út, ið er nýskapandi í føroyskum høpi*

TÓNLEIKUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð er ein nýmótans føroyskur poppsangur í Britney Spears stíli sendur í umferð. Ann Anthoniussen syngur nýggja lagið, ið eitur Nice, sum Bárður Háberg hevur gjørt og skrivað saman við Casey Monroe.

Júst hesin stílurin er ongantíð áður royndur av einum føroyingi, og má sigast at hetta er nýskapandi.

Ann Anthoniussen er 18 ára gomul og uppvaksin á Morskranesi, har hon búði inntil hon fyri tveimum árum síðani flutti til Havnar at ganga á FHS. Í dag arbeiðir hon sum skrivstovulærlingur hjá Vodafone, men viðsíðunaav hesum borgarliga starvinum roynir hon nú at bróta ígjøgnum á tónleikaøkinum.

### Gingið skjótt framá

Tíðliga í summar byrjaði hon at ringja runt til ymisk fólk, og sóknaðist eftir onkrum, ið kundi framleiða eitt lag saman við henni. Eftir at hava ringt til fleiri kom hon í samband við Bárður Háberg, ið beinanvegin var við upp á æltanina. Hann hevur fleiri kontaktir uttanlands og tað endaði við at hann gjørdi eitt lag saman við Casey Monroe, ið syngur og skrivar sangir uttanlands.

Í byrjanuni tosaðu Ann Anthoniussen og Bárður Háberg um ymisk hugskot. Ann Anthoniussen siti hvønn sang hon vildi hava, og so gjørdi Bárður lagið til hana. Sjálva sangin byrjaðu tey veruliga at framleiða fyri trimum til fýra vikum síðan, og nú er hann longu sendur í umferð.

### Altíð dámað stílin

Sum 12 ella 13 ára gomul byrjaði Ann Anthoniussen at syngja við Ungdómskórinum á Strondum, har tey í høvuðsheitum sungu gospelsangir og vanligan kórtónleik. Men Ann dylir ikki fyri, at tað er júst hesin stílurin, ið appellerar til hana, og at hon altíð hevur dámt sera væl henda stílin. Hon hevði ein dreym um at syngja henda stílin, og við nýggja sanginum »Nice« hevur hon nú gjørt álvara av dreyminum.

Orsøkin til at hon valdi henda stílin er eisini tí at hon vil appelera til ein málbólk, ið stílar eitt sindur omanfyri eitt nú Faroe5 og Poppkorn. Hennara málbólkur eru tey millum 16 og 25 ára gomlu, tá hesin aldursbólkurin eru júst tey, sum dáma sera væl hetta slagið av tónleiki, ið verður spældur sera nógv á eitt nú MTV og The Voice fyri tíðina.

### Í dialog við Voice og P3

Tá tey sendu sangin í umferð, sendu tey eisini sangin til aðrar útvarpsstøðir enn tær føroysku, eitt nú The Voice og P3 í Danmark. Donsku støðirnar hava tikið sera væl ímóti sanginum, og serliga The Voice eru spentir uppá nýggja lagið frá føroysku songkvinnuni.

The Voice hava, síðan tey hoyrdu sangin, sett seg í samband við ymisk plátufeløg, tí tey meta at stórir møguleikar liggja í sanginum.

### Meira á veg

Fyrsti sangurin er júst settur í umferð, men Ann Anthoniussen ætlar ikki at steðga her. Saman við Bárði Háberg arbeiða tey við fleiri møguleikum, og væntar hon sjálv at enn ein sangur verður at hoyra fyrst í nýggja árinum.

Eisini arbeiða tey við at gera eitt videolag til sangin, eins og tey longu eru byrjaði at framleiða eitt image til hana, ið líkist nógv tí imageinum, ið vit kenna frá sangarinnum sum Rhianna, Britney Spears og aðrar popp og R&B sangarinnur.

Men áðrenn hon fer at arbeiða víðari við tónleikinum, ætlar hon sær fyrst at halda jólaferiu og fáa ró aftur í lívið.



*Nýggi sangurin, ið ber heitið »Nice«, hevur longu fingið jaliga móttøku á millum annað The Voice og P3 í Danmark*

*Jólasølan*
*á Verkhúsinum Stíggjur 2008*
*Hósdagin 4. desembur kl 14-18.*
*Fríggjadagin 5. desembur kl 14-19.*
*Eisini verður málningaframsýning, tombola og kaffisøla.*
*Øll eru hjartaliga vælkomin.*
*Verkhúsið Stíggjur*
*Saltangará*